# boppur so fantastiskar

Hví halda mannfólk boppur vera so spennandi? Vit hava bjóðað trimum kendum mannfólkum ein túr á Hvonn í Vágsbotni, har vit tráspyrja teir um, hvat tað í veruleikanum er, sum ger, at mannfólk elska boppur



**PANELIÐ**

| Kim Hansen | Terji Rasmussen | Høgni Mohr |
|---|---|---|
| 37 ár | 42 ár | 40 ár |
| 10. flokk | Pedagogur og miljøterapeut, | Maskinsmiður, |
| Tónleikari | tónleikari og stjóri í Studio Oyravox | men arbeiðir sum journalistur |
| Í parlagi | Í parlagi | Giftur |

**1. Nær byrjaðu tit at hyggja at boppum?**

**Kim:** Frá fyrsta degi. Tað er jú tað fyrsta, tú fær slongt upp í andlitið, tá tú kemur í verðina.
**Terji:** Ja. Eg hugdi eisini, tá eg var smádrongur. Onkuntíð, tá lærarinnan kom inn í skúlastovuna, sat eg bara og stardi og hugsaði »wauw!«
**Høgni:** Frá tí, eg gavst at súgva, til eg var eini 12 ár, hugdi eg ikki so nógv. Men síðan hava tær fylt ótrúliga nógv av kvinnuni.
**Terji:** Ja, tú mást ordiliga lyfta høkuna upp fyri at fáa eygnakontakt...
**Høgni:** ..og at hyggja er nakað, sum hongur við.

**2. Hvussu eita tær?**

**Terji:** Umframt boppur ella bróst, eisini onnur nøvn, til dømis júgur, nøtir, boyur og hondtøk.
**Kim:** Altso ja, og forlyktir og melónir ...
**Høgni:** .. og vimplar og spejlegg eisini.

**3. Hvat er tað, sum er so hugtakandi við boppum?**

**Høgni:** Fyri tað fyrsta, at tær gera kvinnuna øðrvísi enn okkum mannfólk.
**Terji:** Ja, tað er formurin, sum ger tær øgiliga hugtakandi. Men reyvin er sgu eisini ótrúliga viktig.
**Kim:** Ja absolutt, boppurnar eru ein partur av øllum.
**Høgni:** Men tað hevur kanska aftur nakað við tað at gera, at tað er eitt tað fyrsta, sum tú sært, tá tú kemur í verðina. Kanska tað hevur nakað við ødipus kompleksið at gera.

**4. Hvussu ofta hyggja tit at boppum?**

**Terji:** Alla tíðina!
**Kim:** Ja, tað passar. Vissi tú eygleiðir eitt konufólk, so hyggur tú eisini at boppunum, kanska næst at reyvini og eygunum. Tað er so nógv, sum hugtekur við eini kvinnu.
**Høgni:** Vissi eg líka kann siga eina søgu. Ein dagin eg kom súkklandi oman til Steinatún, kom ein genta gangandi har í summarklæðum og einari skríggjandi gulari blusu, og har boppurnar stóðu frameftir sum tveir stórir vimplar, sum bara søgdu »Hygg her«. Sum ein góður ferðandi í ferðsluni, hugdi eg uttan um meg, áðrenn eg súkklaði víðari, og har varnaðist eg, at hvørt einasta mannfólk nærhendis hugdi eftir henni. Tað sigur kanska nokkso nógv.
**Terji:** Ja, og kvinnur eru eisini ótrúliga bevístar um, hvussu tær kunnu brúka tær til at fáa uppmerksomheitina.

**5. Hvussu definera tit góðar boppur?**

**Terji:** Síggi eg ein skurð undir boppuni, so er tað fullkomið turnoff!
**Kim:** Ja, og hanga tær, so kann man gott lata tær í ein lekkran bróstahaldara.
**Høgni:** Tað skal sjálvandi hanga saman við restini. Tær skulu gjarna vera eitt sindur fastar og ikki hanga.
**Terji:** Ja, men tær skulu passa til restina av kroppinum, so eru tær góðar.
**Kim:** Tú mást helst kunna lyfta tær eitt sindur, og føla vektina í teimum ☺

**6. Hvussu skulu bróstvørturnar síggja út?**

**Terji:** Tær skulu vera livandi. Tú skal føla, tá hon er tendrað. Men tað er ikki umráðandi, at tær standa og stritta alla tíðina. Tað skal bara vera sjálv vørtan, sum "vaknar", so tær ikki líkjast súgvikoppum. Og tað skulu ikki vera hár á.
**Høgni:** Ringurin kring bróstvørtuna skal ikki dekka for langt út yvir boppuna.
**Kim:** Nei, tað skal hann ikki.
**Høgni:** Tað skal heldur ikki vera for nógvur munur á litinum á boppunum og bróstvørtunum.

**7. Hvussu hava tit tað við silikon, innleggum og push-up?**

**Terji:** Push-up er okey. Men hitt er eitt sindur turn-off, haldi eg.